# Næstan 900 børn standa á bíðilsta kring alt landið

*Tað er hørð kapping um frítíðina hjá børnum. Og at ganga í musikkskúla er nú eitt ítriv, sum veruliga er blivið eitt alternativ til ítróttin. Men bíðilistin er langur*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Nógv fólk standa á bíðlista eftir at sleppa framat á musikkskúlanum. Men Havnin spurtar frá bygdunum*

Bara í Havnini standa 500 børn á bíðilista.

Og um alt landið eru tað næstan 900 børn, sum bíða eftir at sleppa framat.

At ganga í musikkskúla er nú blivið eitt veruligt alternativ til ítróttin.

Í løtuni eru tað 1.070 børn, sum ganga í musikkskúla kring alt landið.

Av teimum ganga um 450 børn í skúla í Havnini.

Men umframt øll hesi, sum Musikkskúlin er við til at geva eitt innihald í lívinum, eru tað mong onnur, sum ikki sleppa í skúla, hóast tey fegin vilja.

Martin Mouritsen, leiðari á Føroya Musikkskúla, sigur, at tað er um alt landið, at tað er ein langur bíðilisti eftir at sleppa framat.

– Summastaðni hava tey gjørt eitt ávíst uppsøkjandi arbeiði og tað hevur sjálvsagt eisini havt sína ávirkan á bíðilistarnar.

Men í Havnini er onki gjørt fyri at fáa næmingar at melda seg til, so tey, sum standa á bíðilista í høvuðsstaðnum, eru alt børn, sum veruliga hava hug at spæla.

Og hann leggur afturat,at bíðilistin bara longist og longist.

Nógv tað best umtókta ljóðførið er klaverið, og bara í Havnini er helvtin av bíðilistanum, børn, sum vilja sleppa at spæla klaver.

Men tann tørvin ber ikki til at nøkta.

– Tað ber ikki til bara at seta klaverlærarar. Men tað skal eisini skoytast uppí, at fremsta endamálið hjá Musikkskúlanum er at læra børnini samanspæl.

### Mugu vísa áhuga

Leiðarin á Musikkskúlanum sigur, at av tí, at áhugin fyri skúlanum er so nógv størri enn tað, sum orka er til at nøkta, verður skúlin noyddur til at seta ávís krøv til børnini.

Men hann leggur dent á, at ongi krøv verða sett til gávurnar hjá børnum, tí skúlin er fyri øll.

– Tey einastu krøvini, vit seta til børnini, er, at tey vísa áhuga og møta upp, so at tey ikki bara taka eitt pláss, uttan at gera nakað við tað.

Tó vita vit eisini, at tað kunnu verða orsøkir til, at børninini ikki møta so væl upp ávísar tíðir.

### Útlit fyri menning

í løtuni eru 25 lærarar í Musikkskúlanum. Umframt úr Føroyum og norðurlondum annars, koma teir úr so ymsum londum, sum Bulgaria, Russlandi, Sveis og Onglandi.

Og hetta metir Martin Mouritsen avgjørt sum eina styrki, tí tað gevur musikklívinum íblástir úr nógvum ymsum mentanum.

Tilsamans kostar musikkskúlin landinum 4,9 milliónir í ár og tilsamans kostar hann knappar átta milliónir.

Landið betalir helvtina av læraralønunum, umframt ferðingina hjá lærarunum.

Hina helvtina av læraralønunum betala kommunurnar.

leiðarin hevur vónir um at Musikkskúlin fer at mennast.

– So at siga allar kommunurnar vilja hava Musikkskúlan at mennast og sostatt skuldi grundarlag eisini verið hjá landinum at styrkt hann.

Hann nevnir, at tað verður eisini neyðugt at styrkja leiðarastørvini kring landið, tí tey eru rættiliga krevjandi, men verða í dag mest rokna sum eitt ískoyti til annað arbeiðið.

### Havnin spurtar frá

Martin Mouritsen vísir eisini á, at tað er rættiliga stórur munur á musikkskúlanum í Havnini og á bygd.

– Tað vísir seg sum um Havnin spurtar frá øllum hinum.

Hann heldur, at hetta kemst av, at havnarfólk hava ein annan hugburð til musikkundirvísing enn bygdarfólk hava.

– Tað vísir seg, sum at foreldur í Havn eru ídnari at melda børn til, og at halda teimum til.

Hann vísir eisini á, at støðið í Havn hækkar skjótari enn á bygd so at gloppið veksur.

– Hetta er óheppið, men hinvegin ber tað heldur ikki til at steðga menningini í Havn, fyri at alt skal vera á sama støði, sigur Martin Mouritsen.

# Eitt spennandi summar hjá Strandferðsluni

*Øll skip hjá Strandferðsluni skulu á beding, men nú kann arbeiðið ikki so frægt sum byrja, fyrrenn summarsiglingin er í hond og tað kann fáa stórar avleiðingar fyri ferðasambandið*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað kemur rættilgia illa við hjá Strandferðsluni at frætta, at tað kann ganga ein heilur mánaður enn, áðrenn stovnurin fær at vita, um hann fær meiri pening at arbeiða við

Strandferðslan hevur brúk fyri sjey milliónum afturat fyri at arbeiðið ikki skal steðga upp.

Hetta er ein støða, sum Standferðslan kom í, eftir at løgtingið noktaði fyri at ferðaseðlaprísirnir hækkaðu, samstundis sum løgtingið heldur ikki vildi játtað henni meiri pening á fíggjarlógini.

Ætlanin hevur verið, at hon skuldi fáa hesa upphæddina á eini eykajáttanarlóg, sum skuldi leggjast fyri tingið.

Eftir ætlanini, sum samgongan hevur lagt, verður tann fyrsta eykajáttanarlógin løgd fram nú í mars mánaði.

Lógin er nú til politiska viðgerð og tá ið tað er liðugt, verður hon løgd fram.

Eftir at hon er løgd framm skal viðgerðin ganga sína gongd so tað kann skjótt ganga ein mánaður, áðrenn Strandferðslan fær pengingin.

### Spennandi summar

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hetta er ógvuliga óheppið.

Hann sigur, at øll skipini hjá Strandferðsluni skulu á beding einaferð um árið.

Alt tað arbeiðið plagar Strandferðslan at avgreiða, í góðari tíð um várið ímeðan lítið fólk ferðast.



*Enn fær Strandferðslan onki gjørt, tí hon hevur ongan pening. Hetta fær uttan iva onkrar avleiðingar fyri siglingina seinni, sigur tekniski stjórin*

– Men sum er, fáa vit onki gjørt, tí vit hava ongan pening.

– Og sum útlitini nú eru, fáa vit kanska ikki peningin fyrrenn um ein mánað, og sostatt verður tað heldur ikki fyrrenn tá, at vit kunnu leggja umvælingar eftirsýn til rættis, sigur Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni.

– Tað vil so aftur siga, at vit kunnu nóg illa byrjað uppá arbeiðið, fyrenn summarsiglingin er í hondum.

Tekniski stjórin sigur, at hann ivast ikki í, at hetta fer at fáa onkrar avleiðingar fyri ferðasambandið.

Hvørjar avleiðingar, tað kann fáa við sær, vil hann ikki útgreinað.

Men hann dylir ikki fyri, at hann sær fram ímóti einum „spennandi“ summarið, tí hann væntar ikki, at alt ger at ganga, sum tað skal.

### Smyril og Ternan ringast fyri

Magnus Magnussen sigur, at ringast fyri eru Ternan og Smyril.

Ternan skal hava ábøtur so at fólk kunnu sleppa turrskødd í bjargingarbátarnar.

–Tað skal verða gjørd áðrenn fyrst í juli, men tað eru heilir tríggir mánaðir at bíða eftir summari av útgerðini, sum skal umborð.

– Somuleiðis skal Smyril hava umfatandi ábøtur, sum taka minst ein mánað, kanska seks vikur.

Hann sigur, at fær Strandferðslan ikki eykajáttanina fyrrenn um ein mánaða, skal tað berast skjótt at.

– Men vit skulu eisini hava í huga, at tað er ikki vist, at skipasmiðjurnar eru klárar akkurát, tá ið vit eru klárar. Tá ið tað skal berast so skjótt at, kann tað henda, at skip koma at bíða eftir skipasmiðjuni.

Hann leggur afturat, at ætlanin var eisini at bjóða arbeiðini út. Men tað sær svart út, nú játtanin kemur so seint.

– Nú verður tað helst so, at skipini mugu á tað fyrstu og bestu skipasmiðjuni, sum tann taka tey. Og undir slíkum umstøðum eru kann tað væl henda, at umvælingar verða dýrari, enn tær annars høvdu verið, sigur Magnus Magnussen.



# Arbeiða saman um álit

*Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin eru nú farnir miðvíst til verka at skriva eitt felags álit til samráðingarnar um ríkisrættarligu støðuna. Miðflokkurin hevur orðað sítt egna álit*

JOHN JOHANNESSEN



*Væntandi skulu ikki so heilt nóvgir fundir til afturat, áðrenn uttanlandsnevndin er liðug at viðgera fullveldismálið*

Nú nærkast endanum av viðgerðini av fullveldismálinum í uttanlandsnevndini. Klokkan níggju fríggjamorgunin fara samgonguflokkarnir í uttanlandsnevndini at leggja fram eina kladdu til eitt álit til landsstýrið um, hvussu tað skal bera seg at í ríkisrættarligu samráðingunum við danir.

Somuleiðis fara andstøðuflokkarnir at leggja fram fram kladdur til síni álit fríggjamorgunin. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fara restina av vikuni at arbeiða við einum felags áliti, og Miðflokkurin hevur longu orðað sær nøkur lyklaorð.

### Møguleiki fyri meiriluta í andstøðuni

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin síggja báðir møguleika fyri, at Miðflokkurin verður við í teirra áliti, soleiðis, at andstøðan í veruleikanum fer at leggja eitt meirilutaálit fyri landsstýrið.

Bæði Heðin Mortensen og Jóannes Eidesgaard siga seg síggja stóran møguleika fyri, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fara at semjast um eitt felags álit áðrenn fríggjadagin. Teir vóna eisini at fáa Miðflokkin við, men kortini eru teir ikki so heilt vísir í, at hetta fer at bera til.

– Miðflokkurin hevur síðani fullveldismálið tók seg upp allatíðina havt ein heilt serligan leiklut í tí. Hesin leiklutur hevur verið, at landsstýrið allatíðina hevur roknað við Miðflokkinum. Tí er ilt at siga, hvat fer at henda áðrenn fríggjadagin, sigur Jóannes Eidesgaard.

Heðin Mortensen er púra vísur í, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin kunnu semjast um eitt álit, og hann heldur tað ikki vera annað enn heilt náttúrligt, at Miðflokkurin eisini verður við.

### Bíðar eftir samráðingarúrslitinum

Jenis av Rana sigur seg ikki duga at síggja nakran mun á tí, sum samgongan ætlar sær og tað, sum Javnaðarflokkurin gjørdi greitt á eykalandsfundinum seinasta leygardag.

Tí heldur Jenis av Rana tað ikki vera nakað minni enn eitt kvett, um tað eydnast Javnaðarflokkinum at fáa Sambandsflokkinum at skriva álit saman við sær.

– Fær Javnaðarflokkurin førkað Sambandsflokkin so mikið, at teir báðir flokkarnir skriva álit saman, so er meirilutin í uttanlandsnevndini vorðin so stórur, sum hann yvirhøvur kann vera. Tá eru allir flokkarnir samdir um, at landsstýrið skal fara til Danmarkar at samráðast um ein sáttmála, sigur Jenis av Rana og vísir á, at verður hetta veruleiki, eru allir flokkar samdir í øllum uttan nøkrum fáum hugtøkum.

Miðflokkurin fer ikki at skiva álit saman við Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum. Men fríggjadagin fer hann at hyggja at, hvat álit tryggjar føroyingum bestu liviumstøður í framtíðini, og tí álitinum fer hann at stuðla.

Væntast kann, at Miðflokkurin fer at stuðla samgonguni, tí hann vil fegin síggja eitt samráðingarúrslit, støða kann takast til. Men hann leggur dent á, at vælferðin hjá einstaka føroyinginum skal vera trygg framyvir.

# Krúnborg fekk hol gjøgnum dekkið

*Nýggja Krúnborg mátti herfyri bróta túrin av, tá eygað, sum blokkurin hekk í, slitnaði og fór niður gjøgnum dekkið*

JOHN JOHANNESSEN

Nýggja nótaskipið, Krúnborg, hjá Eileri Jacobsen fekk á seinasta túrinum eitt hol, sum var 20 cm í tvørmáti, niður gjøgnum dekkið.

Hetta hendi tá eygað, sum blokkurin, ið helt trolinum, hekk í slitnaði og fór niður gjøgnum dekkið.

Orsøkin til óhappi var helst vánaligt veður. Ringa veðrið gjørdi nevniliga, at trolið, sum hekk í blokkinum tók at søkka, og hetta toldi blokkurin ikki.

### Trolið skrædnaði

At hol kom gjøgnum dekkið var ikki einasti trupulleikin, Krúnborg fekk at dragast við á sínum triðja svartkjaftatúri. Annað av trolunum skrædnaði eisini illa, og verður tað nú umvælt hjá trolvirkinum, Vónini, í Fuglafirði.

Eiler Jacobsen sigur, at tað trolið, ið skrædnaði, var tað minna av báðum trolunum hjá Krúnborg. Men hetta var í veruleikanum betra trolið, tí tá roynt verður við stórum troli í ringum verðri og nógv kemur í, er vandi fyri at missa alt trolið, sum tað er.

Verðrið hevur verið ringt meðan Krúnborg hevur verið til fiskiskap, men Eiler Jacobsen sigur, at skipið hevur roynst ómetaliga væl í ringa veðrinum.

– Á veg heim av einum túri var vindmegin 44 metrar um sekundið beint inn á síðuna á skipinum, men hetta gjørdi ikki mun, sigur Eiler Jacobsen frá manningini.

### Nógvir trupulleikar

Trupulleikarnir á seinasta túrinum hjá Krúnborg vóru ikki teir fyrstu, reiðaríið hevur havt at dragast við, síðani tað skuldi yvirtaka skipið.

Tá skipið skuldi takast yvir vóru trupulleikar við prísinum á skipinum í mun til gomlu Krúnborg, sum Eiler Jacobsen hevði selt skipasmiðjuni. Skipasmiðjan var ikki nógd við standin á gamla skipinum, og vildi tí ikki lata fullan prís fyri gomlu Krúnborg. Tískil kom nýggja skipið at kosta meira enn ætlað.

Tá Krúnborg var komin til Føroya og skuldi fara til fiskiskap vóru trupulleikar við onkurm hyraulikrøri og síðani vóru eisini trupulleikar við umstýringini.

Alt hetta varð fingið í rættlag, og Krúnborg fór til fiskiskap. Men trupulleikarnir við umstýringini tóku seg upp aftur saman við trupulleikunum, ið stungu seg upp undir seinasta túri.



*Krúnborg liggur enn einaferð við bryggju orsakað av trupulleikum við umstýringini*

### Kortini góðar vónir

Tórshavnar Skipasmiðja hevur sveisað holið í dekkinum á Krúnborg aftur og trolið er umvæl hjá Vónini í Fuglafirði.

Nú verður bert bíða eftir, at umstýringin er liðugt umvæld, so fer skipið aftur til fiskiskap.

Til at umvæla umstýringina, er ein maður frá verksmiðjuni, ið hevur gjørt motorin, komin úr Finlandi.

Eilier Jacobsen sigur seg hava góðar vónir fyri, at tað fer at gangast væl hjá Krúnborg, hóast óvanliga nógvir trupulleikar hava verið at drigist við síðani skipið kom til landið.